LM-018/2022

FYLGISKJAL 10

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Staður: Tórshavn, 26.08.2022
J. nr. (MEGD): 701-10-2022
Ummælistíð: 08.08.2022 til 26.08.2022
J.nr (AMR).: 22/12461-8

Hoyringarskriv viðvíkjandi

Uppskoti til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti

(Oljuískoyti til húski)

MEGD takkar fyri lógaruppskotið, sum er sent okkum til ummælis, og vil vegna limafeløgini senda fylgjandi viðmerkingar:

1. Sáttmáli sameindu tjóða fyri einstaklingar, ið bera brek (Breksáttmálin),[1] leggur dent á týdningin av *at varpa ljós á, at meginparturin av fólki, ið bera brek, liva í fátækt,* og samstundis *álvarsama tørvin á at gera nakað við ta ringu ávirkanina, sum fátækradømi hevur á fólk, ið bera brek.*

   Tíverri hava vit als ikki nøktandi hagtøl fyri brekøkið í Føroyum, og vita tískil ikki við vissu, í hvønn mun borgarar við breki liva fátækradømi í Føroyum, samanborið við onnur lond. MEGD vil av hesi orsøk vísa á, at tað er alneyðugt at fáa hagtøl fyri brekøkið skjótast gjørligt, eitt nú fyri at fáa grundarlag fyri at smíða munagóða lóggávu, ið rakar rætt og rímuligt innan brekøkið.

   MEGD metir, at brekøkið í Føroyum helst minnir um brekøkini í grannalondunum, har borgarar við breki tíverri liva í nógv størri fátækradømi, samanborið við borgarar, ið ikki bera brek. Tað er dýrari at liva í Føroyum, enn í grannalondunum, og sostatt er vandi fyri, at fátækradømi er meira útbreitt innan brekøkið í Føroyum, enn í grannalondum okkara.

[1] Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008. Skjal 1. Inngangurin, stykki *t.*

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

2. Sambært Breksáttmálanum[2] hava lond skyldu at taka øll hóskandi stig at tryggja, at rímiligar tillagingar verða gjørdar í sambandi við lógarsmíð til tess at fremja javnrættindi og beina fyri mismuni innan brekøkið. Broytingin í *løgtingslógini um familjuískoyti* eigur í hesum høpi at taka atlit til fylgjandi:

   - Í seinastu mánaðirnar er tað vorðið nógv dýrari hjá borgarum í Føroyum at liva, og ábendingar eru um, at støðan fer at versna. Útreiðslurnar hjá føroyskum húskjum, og borgarum, ið bera brek, eru nógv øktar, serliga til mat, byggitilfar og olju. Stórur vandi er fyri, at um stuðulin verður avmarkaður til *olju*útreiðslur, fara borgarar, ið bera brek, at verða í lutfallsliga størri og meira álvarsomum fíggjarligum trupulleikum, enn aðrir samfelagsbólkar.

   MEGD metir tí, at við ískoyti einans til ojlu, fer fátækradømi innan brekøkið í Føroyum framvegis at hækka serliga nógv, millum annað tí at útreiðslurnar til mat eisini eru lutfallsliga nógv hækkaðar, og kunnu halda á fram at hækka.

   - Borgarar, ið bera brek, hava aloftast eyka útreiðslur, orsaka av sínum breki. Talan kann vera um útreiðlsur til heilivág, serligan kost ella til ferðing til og frá apoteki ella viðgerðum.

   MEGD stúrir tí fyri, at við hesum eyka útreiðslum fer búskaparkreppan at raka borgarar við breki serliga meint, uttan so at viðkomandi galdandi lóggáva verður tillagað ella nýggj lóggáva smíðað.

   - Borgarar, ið bera brek, eru ofta fyri skerdari inntøku ella skerdum inntøkumøguleikum. Hetta kann vera orsaka av avmarkaðari kropsligari og/ella sálarligari orku, verri umstøðum ella skerdum førleikum at arbeiða, orsaka av breki sínum. Hesar avbjóðingar eru generellar, og verða munandi verri, nú gerandisútreiðslur dýrka. Tí kann tað lættliga koma fyri, at hesir borgarar ikki hava ráð til at keypa egnan bústað, men eru noyddir at leiga ella at búgva heima hjá familju ella kenningum. Ein lætti í oljuprísunum merkir sostatt, at hesir borgarar ikki fáa ágóðan av einum *olju*ískoyti, men høvdu havt betri av stuðli til aðrar gerandisvørur.

   MEGD vil mæla til, at húski í Føroyum, harundir borgarar, ið bera brek, sum eru harðast rakt av búskaparkreppuni, áttu antin burturav ella lutvíst at fingið bjóðað ískoyti til annað, ið er dýrkað, eitt nú mat, heilivág og ferðing til og frá viðgerðum.

   MEGD vónar, at borgarar við breki, ið lúka treytirnar fyri at fáa ískoyti, eisini fáa nøktandi vegleiðing og javnbjóðis møguleika og - um neyðugt - stuðul til at søkja

[2] Sama kelda, sum áður. Grein 5, stykki 2 og 3.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

stuðul, og at atlit verða tikin til *atkomu*, soleiðis at rættindini hjá borgarum til at fáa ískoyti ikki verður avmarkað orsaka av brekinum hjá borgarum.

3. Sambært Breksáttmálanum[3] hava almennir myndugleikar í Føroyum *skyldu* at leita sær ráð hjá fólki, ið bera brek, og taka tey við í arbeiðið, tá ið lóggáva, mannagongdir og avgerðartilgongdir um viðurskifti, sum víkja at fólki, ið bera brek, verða evnað til.

   MEGD fegnast tí um at fáa hetta uppskotið til hoyringar, men vil samstundis vísa á, at hoyringarfreistin er ov stutt. MEGD fekk hetta uppskotið hin 8. august - mitt í summarfrítíðini – og hoyringarfreistin er 26. august, altso einans 16 dagar seinni. MEGD hevur 24 limafeløg, og áleið 4000 limir, sum hava rætt til at vera hoyrdir á virðiligan hátt í sambandi við øll viðkomandi mál, og serliga í sambandi við mál av eins stórum týdningi, sum hetta málið.

   Flestu feløgini hjá MEGD verða rikin antin av borgarum, sum orsaka av sínum breki hava niðursetta orku, og/ella av sjálvbodnum, sum arbeiða fulla ella part-tíð, ella sum fyritíðarpensjonistar. Fyri limafeløgini hjá MEGD hevði tað tí verið ein greiður fyrimunur at fingið longri tíð at práta um og viðmerkt hetta uppskotið til hoyringar, og helst ikki mitt í summarfrítíðini. Nøktandi hevði verið, um hoyringarfreistin var 4 vikur, men frægari aftur, um hoyringarfreistirnar vóru longri, eitt nú 6-8 vikur.

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

[3] Sama kelda, sum áður. Grein 4, stk. 3.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo